## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin snarar hann í útsynning, minni vindur og sum frálíður turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og eitt skifti regn ella vátakavi, men seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn ella vátakavi av og á. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, partvís heglingur. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Nýggjur skipalisti




*Skipalistin 2002 líkist sær sjálvum, og tað er gott tað sama*

**Skipalistin 2002 er nú at fáa í sølubúðum kring landið**

BÓKAÚTGÁVA
*Jákup Mørk*

Hetta er tíðin, har bøkur verða givnar út. Ikki bert skaldsøgur, sum eru ætlaðar til jólagávur, men ikki minst hesar føstu útgávurnar, sum hoyra til ávís ár, og sum eisini í minst líka stóran mun verða nýttar sum gávur.

Hin føroyski skipalistin er ein teirra, og nú er triðja útgávan í røðini komin út.

Í bygnaði víkir hon sum so ikki frá teimum, sum hava verið. Her finst at kalla alt tað, sum er neyðugt at vita, tá lagt verður frá landi. Álmanakki, streymtalvur, siglingarfløgg og kallibókstavir eru sjálvandi hentir at hava, og har afturat verða eisini ymisk fyribrigdi viðvíkjandi sigling lýst.

Sum navnið sigur, so er ein hin týdningarmesti parturin av bókini tó sjálvt yvirlitið yvir føroyska flotan. Við snøggum litmyndum verða einstøku skipini lýst, og sjálvandi ber eisini til at síggja viðkomandi upplýsingar um støðd, aldur, reiðarí og so framvegis.

Alt í alt líkist Skipalistin 2002 sær sjálvum, og tað er eisini gott tað sama. Slíkar bøkur skulu fyrst og fremst vera upplýsandi, og tørvur er tí ikki á at fylgja ymsu mótafyribrigdunum í bókaheiminum.

Tað er forlagið á deild, sum gevur bókina út, og staðið fyri umbrótin, repro prentumsiting hevur Repro-Z. Bókin er 500 síður til støddar, og kostar ávíkavist 175 (heft) og 240 (innbundin) krónur.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷10 |
| Qaqortoq | ÷10 |
| Ammassalik | ÷14 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | 2 |
| Reykjavík | ÷5 |
| Seyðisfjørður | ÷4 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 8 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 967 hPa. eystan fyri Ísland fer norðureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 999 hPa. vestanfyri Írland kemur móti Føroyum.




Lágtrýstið við Føroyar fer í landnyrðing og lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer eisini í landnyrðing – eysturum Føroyar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/11 kl. 06⁰⁰– 29/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,9°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 28/11 kl. 06⁰⁰– 29/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 155,0 mm




fæst á apotekunum kring landið





### VESTFALLSKYRRINDI

22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. nov | 05.48 | 18.09 | 04.48 | 17.09 | 05.03 | 17.24 | 07.48 | 20.09 | 08.48 | 21.09 | 04.03 | 16.24 | 03.03 | 15.24 | 06.03 | 18.24 | 07.03 | 19.24 | 05.33 | 17.54 | 06.48 | 19.09 |
| 1. des | 06.30 | 18.55 | 05.30 | 17.55 | 05.45 | 18.10 | 08.30 | 20.55 | 09.30 | 21.55 | 04.45 | 17.10 | 03.45 | 16.10 | 06.45 | 19.10 | 07.45 | 20.10 | 06.15 | 18.40 | 07.30 | 19.55 |
| 2. des | 07.20 | 19.47 | 06.20 | 18.47 | 06.35 | 19.02 | 09.20 | 21.47 | 10.20 | 22.47 | 05.35 | 18.02 | 04.35 | 17.02 | 07.35 | 20.02 | 08.35 | 21.02 | 07.05 | 19.32 | 08.20 | 20.47 |
| 3. des | 08.15 | 20.41 | 07.15 | 19.41 | 07.30 | 19.56 | 10.15 | 22.41 | 11.15 | 23.41 | 06.30 | 18.56 | 05.30 | 17.56 | 08.30 | 20.56 | 09.30 | 21.56 | 08.00 | 20.26 | 09.15 | 21.41 |